## Nýtt sjóverjuskip vitjar

Í morgin kemur nýggja, danska sjóverjuskipið Knud Rasmussen á Havnina. Skipið, sum er smíðað á Karstensens Skibsværft í Skagen, er góðar 71 metrar langt og smáar 15 metrar breitt. Tað skal fyri tað mesta gera tænastu við Føroyar og Grønland. Manningin telur 18. Tað var Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sum gav nýggja skipinum navn tann 22. septembur í fjør. Nú skipið vitjar á Havnini, sleppur almenningurin umborð, tí sunnudagin er opið skip frá klokkan 14 til 16.



*Knud Rasmussen*

# Politikarar lata seg manipulera

**- Tað tykist, sum um fiskifrøðingar hava til uppgávu at leypa ræðslu á fólk fyri at røkka sínum máli, sum er at sleppa at stýra fiskivinnuni, ið teir kortini ikki eru førir fyri. Á hinari síðuni hevur politiski myndugleikin ikki megnað at hildið sína egnu skipan, tí tað fremur ikki stovnsrøkt at taka frá einum bólki at selja einum øðrum, sigur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag**




*- Um politiski myndugleikin vil minka um fiskiflotan, kunnu teir keypa nøkur skip úr flotanum, heldur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**FISKIDAGAR**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinni í dag fara umboð fyri Føroya Fiskimannafelag á fund við vinnunevndina í sambandi við uppskotið hjá landsstýrismanninum í fiski-vinnumálum, Tórbjørn Jacobsen, um søguliga stórar skerjingar av fiskidøgum og øðrum avmarkingum.

Eftir at løgtingið hevði 1. viðgerð av málinum um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap fyrr í vikuni, fór málið í vinnunevndina, sum nú skal gera sítt tilmæli til løgtingið.

Sum skilst, ætlar vinnunevndin at hava sítt tilmæli klárt í morgin, og ein liður í hesi viðgerð er at hava umboð fyri vinnu- og manningarfeløg til hoyringar.

### Álvarsligt mál

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, sigur, at umboð fyri felagið helst fara á fund við vinnunevndina seinnapartin í dag.

- Tað er ikki so avgerandi, um málið kemur aftur úr vinnunevndini longu í morgin – ella ein annan dag. Tað mest avgerandi er, at vinnunevndin tekur sær ta tíð, sum skal til at viðgera hetta stóra og týdningarmikla álvarsmál.

Tá løgtingið hevði 1. viðgerð av lógini um vinnuligan fiskiskap, var Fiskimannafelagið væl umboðað á áhoyraraplássinum í løgtinginum við fýra umboðum, og formaðurin sjálvur fylgdi orðaskiftinum tað mesta av degnum.

- Tað er harmiligt og ikki sørt ræðandi at hoyra, hvussu lítið innlit mong av teimum fólkavaldu hava í okkara høvuðsvinnu. Hetta kom týðiliga til sjóndar í tinginum hendan dagin.

Jan er bersøgin og leggur ikki fingrarnar ímillum, tá hann sigur sína erligu meining um, hvussu hann upplivdi hendan dagin í løgtinginum.

### Á fáum hondum

- Eg haldi, at fleiri av hesum fólkum hava latið seg manipulerað og hava ikki fingið nóg holla ráðgeving til at gera sær sínar egnu meiningar um veruligu viðurskiftini. Í aðrar mátar er líkt til, at onkur tosar fyri kvotubarónar – føroyskar sum útlendskar – ið hugsast kunnu at hava áhuga í, at ogn Føroya fólks endar á fáum hondum.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum heldur ikki, at ráðgevingin hjá Fiskirannsóknarstovuni er nøktandi, tí fleiri av árunum hava tilmælini als ikki samsvarað við ta veiði, sum kom burtur úr, tá samanum kom – og summi ár hava hesi tilmæli verið púrasta burtur við. Hann fýlist eisini á, at formaðurin í fiskidaganevndini, Óli Samró, rør fram undir, at ein línufloti, sum er helvtina minni enn flotin, vit hava í dag, kann fiska somu nøgd av fiski, soleiðis at veiðan hjá hvørjum skipi sær tá verður eina helvt størri.

- Eg havi verið so mikið nógv ár við línu, og eg veit, at hetta letur seg ikki gera. Línuveiða er ikki soleiðis háttað, at hon eins og trolla nótaveiða bara kann »skovla« eina rúgvu av fiski inn í senn. Soleiðis er tað bara ikki við línuni, og tað vita allir, sum kenna nakað til fiskiskap.

### Gjøgnum bakdyrnar

Jan heldur annars, at Heini O. Heinesen, løgtingsmaður, segði tað nokso greitt, tá hann undir viðgerðini vísti á, at politiski myndugleikin hevur skuldina í, at fleiri línuskip eru komin inn í flotan – gjøgnum bakdyrnar, sum løgtingsmaðurin tók til.

- Politiski myndugleikin hevur ikki megnað at hildið sína egnu skipan, tí tað fremur ikki stovnsrøkt at taka frá einum bólki at selja einum øðrum.

Hann heldur tí, at ynskir politiski myndugleikin at minka um fiskiflotan, kunnu teir keypa nøkur skip út úr flotanum.

- Men tað er slett ikki við í kjakinum, hvussu myndugleikarnir hugsa sær, at hetta skal gerast.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum heldur, at tað er inni í sjálvari skipanini, at feilurin liggur – og ikki í fiskidøgunum, sum sami myndugleiki nú mælir til at skerja í ólukkumát.

- Tað tykist, sum um fiskifrøðingar hava til uppgávu at leypa ræðslu á fólk fyri at røkka sínum máli, sum er at sleppa at stýra fiskivinnuni, ið teir kortini ikki eru førir fyri.

### Lítil veiða

Jan dugir ikki at síggja tann stóra trupulleikan við fiskidøgum, nú ein partur av fiskiflotanum liggur – ísfiskatrolarar orsakað av dýrari bunkring og línuskip, tí trupult er at fólk fólk.

Hann er heldur ikki samdur við teimum, sum siga, at útróðrarflotin er so nógv vaksin.

- Av teimum størru útróðrarbátunum eru fáir eftir, og lítil og eingin tilgong er í hesa vinnu. Útróðrarmenninir gerast eldri og eldri, og spurningurin er, hvussu leingi teir, ið eftir eru, vera verandi í útróðrarvinnuni.

Jan Højgaard sigur, at neyvan slepst undan niðurskurði í fiskidøgum so harður, sum ágangurin seinastu tíðina hevur verið.

- Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur tikið rívan til við søguliga stórum skerjingum í talinum av fiskidøgum – 20% hjá partrolaraflotanum og heili 50% hjá húkaflotanum. Eg trúgvi kortini, at Tórbjørn Jacobsen er púrasta greiður yvir, at uppskotið hjá honum slett ikki letur seg fremja í verki.

### Alt kollapsar

Hann sigur, at hevði uppskotið hjá landsstýrismanninum verið samtykt í løgtinginum, hevði hetta ikki skert høvuðsvinnuna bara við eini helvt, men helst við eini 90%, tá hugsað verður um virksemið á landi og avleiddar vinnur.

- Tað sigur seg sjálvt, at við slíkum ógvusligum skerjingum hevði eingin hórað undan – og øll fiskivinnan, sum skal bera øll samfelagnum uppi, hevði kollapsað, sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag.


*- Eg haldi, at fleiri løgtingslimir hava latið seg manipulerað og hava ikki fingið nóg holla ráðgeving til at gera sær sínar egnu meiningar um veruligu viðurskiftini í fiskivinnuni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*